# Úr Lorvík til USA við violin



*Monica Stauss Joensen, violinleikari, og Helene Ringenberg, ið spælir cembalo og Hammerflügel*

**Monika Stauss Joensen, violinleikari, er boðin at koma til USA at halda konsert saman við cembaloleikara úr Sveits**

*Turið Kjølbro*

Monica Stauss Joensen, violinleikari, ættað úr Sveits og búsitandi í Lorvík, er saman við Helene Ringenberg úr Sveits boðin á konsertferð til USA síðst í hesum mánaðinum. Monika við violin og Helene við cembalo og Hammerflügel. Báðar hava tær spælt til konsertir í Føroyum áður. Eitt nú í Listasavninum/Turkihúsinum í Lorvík, ein væl eydnað og væl samansett konsert, og í kommunuskúlahøllini í Havn, har sjálvur Willy Gohl lýddi á. Hann legði síðan til rættis eina konsert, har tær báðar spældu í Winterthur í Sveits.

Tað var júst fyri einum ári síðani, at Monika Stauss Joensen og Helene Ringenberg spældu á Schaffenhausen í Sveits í sambandi við ein Bach-fagnað. Hetta var í høvuðsstaðnum Bern. Hjástødd undir konsertini var Frederic Balazs úr USA. Hann er forsetin og stovnarin av MAY, sum stendur fyri Mucis & Arts for Youth. Hann var so hugtikin av framførslu teirra, at hann beyð teimum at koma til USA at spæla til nakrar konsertir í San Luis Obispo, sum er ein býur, ið liggur miðskeiðis ímillum Los Angeles og San Francisco.

Frederic Balazs, sum er 81 ára gamal, ættaður úr Ungarn, men flutti til USA sum heilt ungur, hevur alt sítt lív stríðst fyri nútíðarlist. Hann hevur givið út fleiri nýggj verk og fingið Alice M. Ditson heiðursløn fyri sítt framúrskarandi íkast til amerikanskan tónleik. Hann er ein avbera góður violinistur og fæst í løtuni mest við at komponera. Annars er hann víðagitin í øðrum samanhangi og hevur eisini fingið fleiri aðrar heiðurslønir.

# Betri bústaðir til øll

**Arkitektafelag Føroya tekur nú stig til at kanna, um bústaðarviðurskiftini í Føroyum eru nøktandi**

BÚSTAÐIR
*Turið Kjølbro*

Undir heitinum Betri bústaðir til øll skipar Arkitektafelag Føroya fyri hoyring í Norð-urlandahúsinum 17. mai. Endamálið er at lýsa bústaðarviðurskiftini í Føroyum í dag og í framtíðini breitt og viðkomandi. Spurningar, sum verða umrøddir, eru eitt nú: byggja vit teir røttu bústaðirnar, hvønn bústaðartørv hava vit í dag og hvønn tørv kunnu vit vænta í framtíðini, eru møguleikar at byggja øðrvísi, og eru nakrar politiskar verkætlanir.

Tiltakið verður skipað sum hoyring, har umboð fyri áhugafeløg, myndugleikar og stovnar greiða frá viðurskiftunum um bústaðir. Tey, sum leggja fram, eru Føroya Kommunufelag, Eldrafelag Føroya, Tórshavnar Kommuna, Húsalánsgrunnurin, Demografi, Føroya Ungdómsráð, Meginfelag Teirra Brekaðu, Arkitektafelag Føroya og Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður.

Hoyringin er almenn og ætlað øllum, sum eru áhugað fyri ella hava ávirkan á bústaðarviðurskiftini. Her verður hugsað um vanligar borgarar, lands- og kommunalpolitikkarar, fakfólk og embætisfólk.

# At vera raktur í síni samtíð

**Altjóða apopleksidagin skipar Heilafelagið fyri kjakfundi fyri at lýsa støðuna hjá teimum, sum verða rakt av apopleksi og afasi**

APOPLEKSIDAGUR
*Turið Kjølbro*

Í morgin 10. mai er altjóða apopleksidagur. Í hesum sambandi skipar Heilafelagið, sum er felag fyri apopleksi og afasirakt, fyri kjakfundi undir heitinum "At ver(ð)a raktur í síni samtíð". Til staðar verða viðkomandi arbeiðsbólkar innan heilsuverkið, almanna- og mentamálastýrið. Endamálið er at koma á tal við hesar bólkar fyri at fáa lýst støðuna hjá teimum, sum eru rakt av apopleksi og afasi, og avvarðandi teirra í dag.

Sjálvan altjóða apopleksidagin letur Heilafelagið upp telefon, har limir og onnur kunnu seta seg í samband við felagið. Heilafelagið hevur nú virkað í fýra ár og hevur fingið skrivstovu í MBF-húsinum á Íslandsvegi 10 C í Havn. Hetta ger, at felagið hevur betri umstøður at virka undir, og tað fer at koma limunum til góðar. Telefonin verður opin hvønn týsdag frá kl. 18.00 til 20.00, fyrstu ferð týsdagin í næstu viku 15. mai.

Høvuðsarbeiðið hjá Heilafelagnum er at upplýsa um apopleksi og afasi. Apopleksi er bløðing ella tøppur í heilanum, afasi er talutrupulleikar sum er ein avleiðing av apopleksini. Endamálsgrein hjá felagnum er at upplýsa um apopleksi og afasi, at bøta um viðgerðar-, undirvísingar- og uppvenjingarmøguleikarnar, at stuðla apopleksi og afasiraktum og avvarðandi teirra, ráðgeva um almennan stuðul, skeið, frítíð og aðra hjálp. At luttaka í heimligum, norrønum og altjóða samstarvi.

Í felagnum er ein bólkur fyri rakt og ein fyri avvarðandi, har fólk í somu støðu koma saman.



VIÐMERKINGAR

# Nýggir yvirmenn hjá Atlantsflog

**Allan Svensson og Kári Petersen eru settir í starv sum nýggir yvirmenn hjá Atlantsflog. Síðani januar hevur felagnum vantað tveir flogskiparar**

FLOGFERÐSLA
*John Johannessen*

FLOGVØLLURIN: Danin, Allan Svensson, og 30 ára gamli sørvingurin, Kári Petersen, eru nýggju menninir aftan fyri stýripinnarnar á British Aeorospace flogførunum hjá Atlantsflog.

Allan Svensson, sum hevur drúgvar royndir í flogferðsluni, verður skipari, og Kári Petersen, sum í hálvtannað ár hevur flogið fyri Kimber Air, verður stýrimaður.



*Kári Petersen, nýggjur stýrimaður, Hans Hansen, yvirflogskipari, og Allan Svensson, nýggjur flogskipari, framman fyri føroyska stoltleikanum í luftini*

*Mynd: John Johannessen*

### Vandu í gjár

Tað vóru helst fleiri í Vágum, sum undraðust, tá tey gjáramorgunin Atlantsflog lenda og fara av stað aftur sjey ferðir.

Men talan var ikki um annað, enn eina kravda venjing. Allan Svensson er ikki vanur at flúgva flogfør av slagnum British Aerospace. Tí skal hann sambært reglunum hjá loftferðslumyndugleikunum fyrst læra seg at flúgva flogfarið í simulatori og síðani lenda tað fimm ferðir, áðrenn hann kann lætta veingjunum við ferðafólki umborð.

Allan Svensson hevur júst verið í Manchester í simulatori, og gjáramorgunin royndi hann flogfarið yvir Vágoynni saman við garvaða yvirflogskiparanum hjá Atlantsflog, Hans Hansen.

### Búgva í Vágum

Allan Svensson sigur seg altíð hava havt serligan áhuga fyri Føroyum og føroysku náttúruni. Tí ætlan hann sær flyta til Sørvágs, nú hann hevur fingið fast starv hjá Atlantsflog.

Eg eri hugtikin av føroysku fjøllunum, sigur Allan Svensson.

Og vit kunnu ikki lata vera við at spyrja Allan Svensson, um fjøllini ikki kunnu vera trupulleiki, tá tú ert flogskipari.

– Fjøllini eru als eingin trupulleiki, so leingi tú veitst, hvar tey standa, svarar Allan Svensson.

Kári Petersen er uppvaksin í Sørvági og sleppur nú at flyta heim aftur. Hann var gjáramorgunin ógvuliga spentur at fáa at vita, um hann skuldi flúgva í vikuskiftinum. Tí hann hevði glett seg at halda 30 ára føðingardag. Men til alla lukku vissaði Hans Hansen hann um, at hann slapp undan og kundi halda føðingardag í friði.

Allan Svensson og Kári Petersen koma í størvini Hans Meinhard á Høgabóli og Heðini Krett, sum í januar fóru í onnur størv úti í heimi.

# Árni Winther vann kappingina um bryggjuna

**Tað verður arkitektavirkið hjá Árna Winther, ið sleppur at gera av, hvussu føroyski parturin av Norðuratlantisku Bryggjuni í Keypmannahavn skal síggja út**

ARKITEKTAKAPPING
*John Johannessen*

Arkitektavirkið hjá Árna Winther vann sera sannførandi kappingina hjá Løgmansskrivstovuni um, hvussu føroyski parturin av Norðuratlantisku Bryggjuni í Keypmannahavn skal síggja út.

Dómsnevndin sigur í grundgeving síni, at hon metir uppskotið hjá Árna Winther listarliga at liggja á einum væl hægri støði, enn hini innkomnu uppskotini.

– Uppskotssetararnir hava við hesum uppskotinum torað at roynt aðra leið, enn ta traditionellu loysnina fyri skrivstovuumhvørvi. Og dómsnevndin metir, at uppskotsstillararnir frá byrjan hava havt eitt greitt konsept at arbeiða við.

– Uppskotið er sera væl frágingið, og dómsnevndin ivast ikki í, at skilgóð virkislig ætlan kann fáast burtur úr framhaldandi viðgerðini av uppskotinum, sigur dómsnevndin millum annað.

### Samanbygd kjarna

Uppskotið er sermerkt av einari samanbygdari kjarnu eftir miðjuni av húsinum, sum er sett saman av fleiri skrivstovuhølum og øðrum neyðugum hjárúmum.

Ein samansett kjarna er hvørjumegin høvuðstrappurúmið. Kjarnurnar eru hildar fríar frá útveggunum og vegginum móti høvuðstrappurúminum við eini gongd, tó soleiðis, at við endaveggirnar er eisini gjørt størri pláss fyri rúmi, ið fjølbroytt kann innrættast fyri seg.

Uppskotsstillararnir ímynda sær, at gongdin verður nýtt til framsýningar umframt vanligu nýtsluna.

Dómsnevndin vísir á, at skilaveggirnir í kjallaranum eru ikki allir setti vinkulrætt á gongsveggin. Hetta gevur eitt spæl av sermerktum rúmum og skotum, sum skilagott kunnu nýtast til eitthvørt skrivstovuendamál.

Atkomuviðurskiftini til móttøkuna eru sera greið.

– Hetta uppskotið hevur, sum tað einasta, hildið verandi súlur fríar. Og í samanspælinum millum nýtt og gamalt, hevur tað megnað at varðveita dygdina í tí gamla, sigur dómsnevndin.

### 1200 fermetrar

Fjórða hæddin í pakkhúsinum á Norðatlantisku Bryggjuni, har føroyingar skulu húsast, er 1200 fermetrar til støddar.

Ætlanin er, at Ferðaráð Føroya og felagsskapinum Northern Periphery Group, sum virkar fyri menning av minni útbygdum økjum í Norðuratlantsumhvørvinum, skulu húsast í bygninginum.

Pláss skal eisini vera til ymiskar føroyskar vinnufyritøkur, stovnar og onnur, ið hava tørv á einum høli í Keypmannahavn í styttri tíðarskeið.

Tað eru arkitektarnir Rúni Abrahamsen, Páll Holm Lave, Pauli Dam Joensen og Sverri Heinesen, ið saman við Árna Winther hava gjørt vinnarauppskotið.



*Árni Winther, arkitektur, greiðir frá uppskoti sínum um føroysku hæddina í pakkhúsinum á Norðuratlantisku Bryggjuni í Keypmannahavn*

*Mynd: John Johannessen*

# Føroyar á dagsskránni



**Føroyar er einasta málið á dagsskránni hjá Fólkatinginum í dag. Fólkatingið fer nevniliga at skifta orð um viðurskiftini við Føroyar**

SJÁLVSTÝRISAMTYKTIN
*John Johannessen*

Í dag verður spurnarorðaskifti í Fólkatinginum um Føroyar.

Allir flokkar á Fólkatingi uttan danski Fólkaflokkurin og Eindarlistin hava sett danska forsætisráðharranum skrivligan fyrispurning um støðuna til sjálvstýrissamtyktina.

Í fyrispurninginum verður Nyrup spurdur, hvat stjórnin kann siga um samráðingarnar millum stjórnina og landsstýrið og ynski landsstýrissins viðvíkjandi framtíðar sambandinum við Danmark.

Spurnarorðaskiftið skal í morgin enda við eini samtykt, har Fólkatingið sigur sína meining um ætlanina hjá landsstýrinum og framtíðarviðurskiftini millum Føroyar og Danmark yvirhøvur.

Endamálið við orðaskiftinum er nevniliga at gera støðuna hjá Fólkatinginum og stjórnini greiða, so landsstýrið kennir støðuna. Tí verður tað hesin fundurin, ið verður grundarlagið undir víðari samskiftinum millum Føroyar og Danmark, hvat sjálvstýri viðvíkur.

Vantandi verður tað ein breiður meiriluti, ið samtykkir linjuna hjá donsku stjórnini mótvegis Føroyum í framtíðini.